# Froskmenn sláa tunnu á sjónum – og á landi

**Eysturoyar Froskmannafelag varð stovnað í fjør, men hevur longu gjørt fleiri túrar við oyggjarnar. Leygardagin verður tunnusláing í bátahylinum í Runavík**

FØSTULÁVINT
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Eins og so manga aðrastaðni fara eisini runavíkingar at sláa tunnu um nakrar dagar í kjallarum, uttandura og aðrastaðni.

Tað er tó ikki á hvørjum degi, at runavíkingar fáa høvi at síggja tunnusláing á sjónum. Men tað er júst eitt tiltak av slíkum slagi, sum Eysturoyar Froskmannafelag fer at skipa fyri leygardagin.

Byrjað verður um morgunin og sær skráin sera forvitnislig út.

## Undir oyggjarnar

Eysturoyar Froskmannafelag er rættiliga nýtt felag, og varð stovnað 26. mai í fjør. Felagið hevur í dag 20 virknar limir í nógvum aldrum.

Felagið hevur longu skipað fyri fleiri tiltøkum. Tey hava m.a. verið við Norðlýsinum undir Nólsoynni og undir Hestoynni.

Leygardagin komandi er so ætlanin, at felagið skal markera seg rættiliga við hesi tunnusláingini í bátahylinum í Runavík.

Byrjað verður longu kl. 9:30 við morgunmati í húsunum hjá eldrafelagnum "Nón", har øll eru vælkomin.

Tá øll hava etið verður farið oman í sjálvan bátahylin, har so froskmenn og froskkvinnur fara at sláa tunnu á sjónum um 11:30-tíðina. Aftaná verður heit suppa at fáa.

Um kvøldið fara so limirnir í felagnum at hugna sær uppi á turrum, tá teir sjálvir fara at sláa tunnu enn einaferð henda dagin. Hetta verður í "Smáttuni" í kjallaranum hjá Føroya Tele.

Í hesum sambandi er møguligt hjá áhugaðum fólkum at tekna seg sum lim í felagnum.



*Faðir og dóttur í froskbúna – Jákup Andrias og Alisa Hentze eru millum ídnu limirnar í Eysturoyar Froskmannafelagi.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**TIL SØLU**
Sofur 2+3, ljóst brúnar, 4.500 kr.
*Tlf. 261083*

**TIL SØLU**
Hvítt spísiborð + 6 stólar + 2 eykaplátir 45 cm, 100 cm br. 150 cm. lang 4.000 kr.
*Tlf. 261083*

**MADRASSUR**
2 Lama madrassur nýggjuar, til sølu vegna feilkeyp. Nýprísur 2.500 stk. seljast fyri 500 stk. mál 70 x 190. Og ein innhurð vinstra 200,-
*Tlf. 313385 ella 513385*

**GÓÐ BÓNDASONG**
við madrassu 90 x 200 cm. tilsølu fyri 1.000,- kr.
*Tlf. 310226/510226*

**SPRINGMADRASSIR**
2 Lama springmadrassir (brúktar) st. 185 x 200 til sølu fyri 300 kr. stk.
*Tlf. 317114/217114*

**ANTIK HARRAGARÐSMØBLAR**
til sølu v/ kúlubein. 1 stovuborð v/ 2 plátum og 6 stólar + 4 stólar eyka vegna plásstrot, um nóg høgt boð fæst.
*Tlf. 272667*

**NÝTT KØKSBORÐ**
við 4 stólum til sølu.
*Tlf. 254866 eftir kl. 18*

**BRÚKTUR KØKUR**
køkur 293 x 305 í vinkul, við hvítvørum til sølu.
*Tlf. 422384*

**TIL SØLU VEGNA FLYTING**
Leðursofa 750 kr, spísiborð v/ 6 stólum 1200, boxmatrass 120 cm, 1000 kr, reol 500 kr, 11/2 ára frystiboks 3000 kr, vaskimaskina 4000 kr.
*Ring e. kl. 1600 á 224508*

**CAFÉBORÐ TIL SØLU**
15 caféborð bíliga til sølu.
*Tlf. 213430*

## Lutaseðlar

**VINNINGARNIR**
á lutaseðlasøluni hjá fyrsta flokki í Miðvágs- Sandavágs Skúla fullu soleiðis: 1. vinningur Hvítur seðil nr. 75 2. vinningur Reyður seðil nr. 32263 3. vinningur Gulur seðil nr. 63 4. vinningur Bláur seðil nr. 23 5. vinningur Grønur seðil nr. 4 6. vinningur Bláur seðil nr. 61 7. vinningur Gulur seðil nr. 36878 8. vinningur Gulur seðil nr. 36894. Allir vinningarnir eru heintaðir. Vit takka hjartaliga fyri tann góða stuðulin.
*1. flokkur í Miðvágs- Sandavágs Skúla*

## Matur

**GOTT NEYTAKJØT**
Neytafjórðingar til sølu. Sent verður kring landið. Framfjórðingar 24 kr. kg. og afturfjórðingar 26. kr. kg. Ring og bílegg á
*tlf. 451222 ella 253168*

## Pløgg

**SKÓTABÚNI**
14 ár, grønur, við turriklæði, belti og knívi til sølu fyri 350 kr.
*Tlf. 310226 ella 510226*

**TIL SØLU**
Konfirmatiónskjóli frá 2004, langur niðurdeilur, str. 36, toppur str. 34 og tunt skjall, selist fyri 1/2 prís.
*Tlf. 441464 ella 260216*

**HONDBUNDIN TROYGGJA**
Til føroyska kvinnubúna, stødd miðal, til sølu.
*Tlf. 441858*

**KONFIRMATIÓNSKJÓLI**
Við jakka bíliga til sølu.( langur,einkultur,str. 36,lilly model).
*Tlf.212803*

**KONFIRMATIÓNSKJÓLI**
langur, við brokadustoffi við ermar og bringustykki, offwhite og egið design, str. 36-38. Skógvar við tunnum reimum str. 38.
*Tlf. 322950/506927*

**LEÐURJAKKI OG FARTELEFON**
av slagnum (Ericsson), jakkin gráur av liti, burturblivið í Kagganum 20. desember. Um nakar veit nakað um hesar lutir, vinarliga ring
*tlf. 506927/256884*

**KONFIRMATIÓNSKJÓLI**
Lilly konfirmatiónskjóli við jakka, str. 38 til sølu fyri 600 kr.
*Tlf. 424309*

**KONFIRMATIÓNSKJÓLI**
str. 38 við tilhoyri (jakki og sandalir) til sølu. Kann seljast hvør sær!
*Tlf. 444845/507673*

**KONFIRMATIÓNSKJÓLI**
við jakka str. 34 Lilly model til sølu.
*Tlf. 226593*

**BÚNI HJÁ LJÓSINUM**
Búni hjá fimleikafelagnum Ljósinum, str. medium, til sølu fyri 250 kr. Nýprísur 550,-
*Tlf. 212206/317560*

## Sjavs

**SJAVS**
Sjavskapping verður sunnudagin kl. 16.00
*NSÍ*

**SJAVSKAPPING**
Verður í LÍF-húsinum hóskvøldið kl. 18.45.
*LÍF*

## Súkklur

**MOTORSÚKKLA TIL SØLU**
Ein Kawasaki KA 650, árg. 1979. Súklan er í góðum mekaniskum standi. At hitta eftir kl. 18.00
*Tlf. 373159*

**TIL SØLU**
125 KB Banacross av slagnum »Husquarna«. Er í góðum standi og verður seld fyri 13.000 kr. Ring
*Tlf. 224354*

**TIL SØLU**
Ein PGO Komet skutari, er spildurnýggjur, við einari bagagubox. Hevur bara koyrt 130 km. Er 3 mán. gomul. 13.000 kr. Spar 3.000 kr.
*Tlf. 252829*

**TIL SØLU**
Thomas Quadro skutari til sølu fyri 4.000 kr.
*Tlf. 371225*

**NÝGGJUR SÚKKLUSKERMAR HIGHTREK 60**
Til sølu fyri 100 kr.
*Tlf. 319371*

**NÝGGJUR SÚKKLUSKERMAR HIGHTREK 60**
Til sølu fyri 100 kr.
*Tlf. 319371*

**HONDA X8RS**
til sølu um hóskandi boð fæst. Árg. 2002, km uml. 8000. Sær gott útog koyrir væl. Ring og fá meira at vita á
*tlf. 504446/316895*

## Teldur

**TELDUSPÆL TIL SØLU**
-man telduspæl til sølu fyri 450 kr. Ongantíð brúkt. Ring
*Tlf. 457227 ella 503508*

**TELDUSKERMUR TIL SØLU**
19'' telduskermur av merkinum Hyundai til sølu fyri 650 kr.
*Tlf. 224739*

**TIL SØLU**
e spøl til Playstation 2. burn Out, Crash Nitro Kart, Driver 3 200 kr. stk.
*Tlf. 263644*

**ER TAÐ NAKAR**
Ið eigur Final Fantasy IX(9) til playstation bíliga til sølu,so vinarliga sigði mær frá. T-bræv: st2008e5@hotmail.com
*Tlf: 509282*

**HEVUR TÚ TRUPULLEIKAR**
við telduni? So vil eg fegin hjálpa. Ring og hoyr nærri
*tlf. 273865*

**GÓÐ FARTELDA**
Ótrúliga góð fartelda til sølu, 17" widescreen skermur, Pentium 4, 3,2 GHz processari, 512 MB Ram, DVD-brennari, taska, tráleys mús o.a. virði uml. 25.000,- 2 mðr. gomul, til sølu fyri 15.000,-
*Tlf. 283568*

**FARTELDA TIL SØLU**
Toshiba windows XP 2002 intel pentium 4, mobile cpu 1.90GHz, 512 RAM, 40 Gigabyte harddisk, CD brennara, DVD avspælara, Taska, netkort + separat mús fylgja við, 11 mánaðar gomul. Kr. 7.500 sí www.gottkeyp.com, /privatlýsingar
*Ring tel. 219886 E-post: meinhardt@post.olivant.fo*

**DVD SPÆLARI**
Akai dvd spælari til sølu fyri 1500 kr. Nýprísur 6.000 kr.
*Tlf. 274545 eftir kl. 15*

## Tónleikur

**TIL SØLU**
Tveir hátalarar JBI - Lx5. Nýprísur uml. 6.600 kr. Eri at hitta eftir kl. 18.00
*Tlf. 267398*

**TIL SØLU**
Tveir hátalarar JBI - Lx5. Nýprísur uml. 6.600 kr. Eri at hitta eftir kl. 18.00
*Tlf. 267398*

**GAMALT TRAKKIORGUL**
Bíliga til sølu.
*Tlf. 311415*

**STEEL GUITARI**
Steel gittari við pedalum og knæbendarum til sølu.
*Tlf. 75 52 51*

**EIN SUPER MULTI DVD REWRITER**
DVD 8x4x2x3x12, CD 24x16x32x til sølu fri 550 kr.
*Tlf. 260106*

**PLÁTUSPÆLARI**
Thorens plátuspælari sera bíliga til sølu.
*Tlf. 448310*

**GUITARFORSTERKARI TIL SØLU**
VOC AC 15 rørforsterkari við Celestion BLUE hátalara kr. 5.000
*Tlf. 421419*

**GUITARI TIL SØLU**
PRS SE við P-90 mikrifonum (Les Paul model)
*Tlf. 421419*

**TIL SØLU**
Cervin vega subar 800 watt, fyri 10.000 kr.
*Tlf. 255569*

**TIL SØLU**
E-V frontur 600 watt, subar og tobbar, lítið brúkt, til sølu fyri 15.000 kr.
*Tlf. 255569*

**KLAVER TIL SØLU**
Eitt lítið brúkt Wurlitzer klaver til sølu.
*Tlf. 310404/510404*

**ROLAND KEYBOARD**
c. 180, 2 ára gamalt, nýprísur 8.000,- selist fyri 5.000 kr.
*Tlf. 444534*

## Út- & Sjónvarp

**SONY FALT-TV**
17'' Sony Widescreen flatskermur til sølu fyri 6.500 kr. Nýprísur 13.-14.000 kr. 15 mán. garanti. Vakurt design, góð myndagóðska.
*Rlf. 310174 ella 210174*

## Ymiskt

**MÁLNINGUR TIL SØLU**
Málningur eftir William Smith (1977) stødd 80x100cm við heitinum "Ruth systir" verður seldur um nóg høgt boð fæst. Digital mynd kann sendast, ring
*Tlf. 584342*

**NIKON TIL SØLU**
Eitt AF-ED Nikkor 80-200mm 1:2.8D objektiv til sølu. Bert brúkt privat. Prísuppskot: 5.500,- . Vinarliga ringi
*Tlf. 211231*

**ATGONGUMERKIR TIL KARDAMUNNUBÝ**
Er tað nakar, ið kann selja mær 3 atgongumerkir til Kardamummubý. Ring
*Tlf. 333062 ella 223088*

**OLJUTANGI**
Inni oljutangi til sølu fyri 1.000 kr.
*Tlf. 443203 ella 211203*

**VINDEYGA TIL SØLU**
Plastvindeyga 198x145, sum nýtt, bíliga til sølu.
*Tlf. 441309*

**TIL SØLU**
2 Flymo sláimaskinur bíliga til sølu.
*Tlf. 210174 ella 310174*

**EFTIRLÝSING**
FK-rabatmerkini frá 60- og 70árunum. Er tað nakar sum eigur nøkur av hesum at lata ella selja.
*Tlf. 321291*

**INNHURÐAR TIL SØLU**
10 innhurðar til sølu.
*Tlf. 216616*

**HEY**
Er tað nakar sum hevur 2 ella 3 atgongumerkir til Fólk og dólgar at selja mær? Ring
*Tlf. 257983*

**APEX FERÐASEÐIL**
1 Apex ferðaseðil á rutinum hjá Atlantic Aiweays til sølu fyri 2.800 kr. Vanligur prísur 3.100 kr. Ring
*Tlf. 226418 eftir kl. 15.00*

**VÁGS PENSIONISTAFELAG**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsa tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlomunum

**YNSKIST**
Hvít wc-kumma og hvítt baðikar v/ tilhoyr.
*Tlf. 210336*

**EIGUR NAKAR**
2 atgongumerkir til fólk og dólgar at selja mær, so vinarliga ring
*tlf. 748317*

**TIL SØLU**
Antik el-seymimaskina Pfaff-minor.
*Tlf. 316440/253440*

**TIL SØLU**
4 termorútar til sølu. Mát: 197,6 x 173,6 x 2,2 cmPrísur 500,- kr.
*Tlf. 215698*

**ÆTLA TIT AT FLYTA TIL DK?**
Vit fara til Danmarkar við flytigóðsi ca 20. februar. Ring og fá eitt gott tilboð.
*Vest-Trans tlf. 227050 fax. 317051*

**VIDEOKAMERA**
Sony mini-dv handycam til sølu fyri kr. 3.000,- 3 mðr. gamalt.
*Tlf. 317034*

**VINDEYGU TIL SØLU**
2 vindeygu b. 140 x 100 og b. 140 x 130 til sølu fyri 500 kr. stk. – termorútar.
*Tlf. 227853*

**BILANLEGG**
2 sett hátalarar, 1 sett á 250 w og 1 sett á 150 w og ein forsterkari, alt er Pioneer til sølu fyri 3.000,-
*Tlf. 256944 ella 448340*

**BILANLEGG TIL SØLU**
Pioneer Deh-P6500 við livandi myndum á skerminum og trimum forsterkara útgangum til sølu fyri 3000 kr. Nærum óbrúkt.
*Tlf. 213067*

**HEY HEY!**
Nú fer at nærkast: Vit fara at hava páskareggja tombola við 600 páskareggum í Glæmuni í Kvívík sunnudagin 27. februar kl. 16.00. Øll eru vælkomin.
*KFUM-skótarnir í Kvívík*